SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Desember, 2013

## Bjargingarbátar: SOLAS Reg. III/20.11.2.4 – Nýggjar reglur í gildi

Vísandi til onnur tíðindaskriv um trygd í sambandi við verkligar royndir av fríttfallandi bjarginarbátum, verður við hesum gjørt vart við SOLAS Reg. III/20.11.2.4 um roynd av frítt fallandi bjargingarbátum.

Omanfyri standandi reglur í SOLAS vórðu samtyktar á MSC-fundunum í IMO í mai 2012 og eru í gildi frá **1. januar 2014**.

Ásetingarnar krevja, at verklig roynd av útgerðini á bjargingarbátinum verður gjørd:

- annað hvørt við fríum falli við einans bátsmanningini umborð
- ella við at eftirlíkna sjóseting við einans bátsmanningini umborð
- ella við at eftirlíkna sjóseting sambært reglum, ið sjóvinnumyndugleikin hevur ásett.

Tí at føroyski sjómynduleikin ikki ásetir serføroyskar reglur, verður víst til hjálagda MSC.1/Circ.1206/Rev.1, ið nýggja reglan vísir til.

Heitt verður á skipaeigarar og rakstrarfeløg við skipum, ið hava hetta slagi av bjargingarbátum umborð, at geva nýggju reglunum gætur og broyta mannagongdir samsvarandi, er slík broyting ikki longu gjørd.

Hjálagt: MSC.1/Circ.1206/Rev.1.

--- 00 ---